## Minni mótstøða ímóti hvalaveiði

Seinastu tíggju árini hevur norska uttanríkisráðið goldið Bobby Evans 1,5 millión krónur fyri at verja norsk áhugamál, hvørja ferð orðaskiftið um hvalaveiði hevur tikið seg upp í USA. Men nú tykist hvalaveiðan hava so lítlan áhuga ímillum amerikanarar, at Bobby Evans er uppsagdur, skrivar Aftenposten.

Ein talskvinna hjá uttanríkisráðnum í Oslo sigur við blaðið, at sendistovan í Washington fær framvegis fyrispurningar um hvalaveiði, men at nú eru spurningarnir so fáir, at sendistovan klárar at svara teimum.

Verri var í nítiárunum, tá stjórnin hjá Bill Clinton hótti við handilstiltøkum ímóti Noregi, tí norðmenn fóru aftur at veiða stórhval í 1993. Í einum brævi til Kongressina skrivaði Clinton, at norska stórhvalaveiðan var í andsøgn við amerikanska lóg, og at tað var nóg mikið til at seta handilstiltøk í verk. Meiri hendi kortini ikki. Fýra ár seinni kravdu heimnáttúrugrunnurin World Wildlife Foundation og Greenpeace, at USA skuldi seta tiltøk í verk ímóti Noregi, sum júst hevði økt hvalaveiðina, men heldur ikki ta ferðina hendi nakað.

## Dálka Eystrasalt

Póland og Svøríki eru tey ringastu at dálka Eystrasalt, men verður dálkingin mátað eftir fólkatalinum, er Svøríki tann stóri syndarin, skrivar svenska blaðið Dagens Nyheter.

Blaðið skrivar, at pólendingar lata 200.000 tons av nitrogeni út í Eystrasalt um árið, meðan tann svenska nøgdin er 117.000 tons. Tað merkir, at hvør pólendingur letur 5 kilo av nitrogeni út í havið árliga og hvør svii 14 kilo. Ein frágreiðing til ta stóru svensku dálkingina er tann langa svenska strondin, at sviar koyra nógv í bili, og at svenski landbúnaðurin dálkar illa.

Dagens Nyheter skrivar, at dálking og ovveiða eru orsøkin til, at toskastovnurin í Eystrasalti er í vanda fyri at doyggja út.

## Spenningur í Bolivia

Mótstøðan ímóti boliviska forsetanum, arlos Mesa, harðnar í hvørjum. Um vikuskiftið fingu fleiri løgreglumenn skaða í samanbrestum við mótmælisfólk, sum royndu at taka bygningin, sum forsetin og tjóðartingið halda til í. Higartil hevur herurin styðjað forsetan, men sunnudagin frættist, at partar av herinum vilja hava hann frá.

Carlos Mesa hevur fingið ein stóran part av boliviska fólkinum ímóti sær, eftir at hann hevur gjørt av at tjóðartaka tann sera týðandi olju- og gassídnaðin. Samstundis hevur hann fingið tingið at taka undir við, at tey útlendsku oljufeløgini skulu gjalda 50 prosent í skatti, men tað halda nógvir bolivar vera alt ov lítið. Teir vilja hava feløgini at gjalda 80 prosent av vinninginum í skatti.

Um vikuskiftið var ein brasilskur sendimaður í Bolivia og kannaði ta spentu støðuna. Heimafturkomin greiddi hann frá, at halda mótmælini ímóti forsetanum fram, kann tað enda við borgarakríggi.

## Kanska flýddur til Iran

Bretska blaðið The Sunday Times vil vera við, at yvirgangsleiðarin Abu Musab al-Zarqawi er flýddur úr Irak til Iran.

Í síðstu viku kunngjørdi felagsskapurin hjá al-Zarqawi, at leiðarin var særdur, og vælvitandi keldur vildu vera við, at hann var vorðin særdur av einari amerikanskari rakett. Amerikanska herleiðslan segði seg ikki hava nakrar upplýsingar um al-Zarqawi, men nú sigur The Sunday Times, at hann er í Iran.

Men tað avsanna iranska myndugleikarnir. Talsmaðurin hjá uttanríkisráðnum í Teheran, Hamid Reza Asefi, segði í gjár, at tað ber ikki til at fjala seg í Iran. Hann legði afturat, at tíðindini í bretska blaðnum eru tann beri heilaspuni.

Amerikanarar halda, at al-Zarqawi hevur skipað fyri mótstøðuni í Irak, og USA hevur lovað 125 milliónir krónur í finningarløn, verður hann avdúkaður.




# NON

**Franska fólkaatkvøðan um ES-grundlógina var líka nógv ein spurningur um innanríkismál, og tí fall grundlógin. Tað sama hendir væntandi í Niðurlondum í morgin**

FÓLKAATKVØÐA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fronsku veljararnir vóru ikki í iva, tá teir tóku støðu til ta ætlaðu ES-grundlógina. 54,9 prosent søgdu nei, og 45,1 prosent søgdu ja.

Ósigurin verður roknaður sum ein dygur smeitur fyri Jaques Chirac, forseta, sum av øllum alvi stríddist fyri at fáa veljararnar at atkvøða ja. Hann viðgekk ósigurin sunnukvøldið og boðaði samstundis frá, at úrslitið fer at hava broytingar í stjórnini við sær.

Samstundis kravdu fleiri, at forsetin eigur at leggja frá sær. Hann víðgongdi høgramaðurin Jean-Marie Le Pen, sum var ein av oddamonnunum ímóti ES-grundlógini, segði bart út, at forsetin er ikki førur fyri at leiða franska fólkið longur.

Men forsetin fer ikki frá. Harafturímóti verður roknað við, at Jean-Pierre Raffarin, forsætisráðharri, noyðist frá, og tey flestu vænta, at Dominique de Villepin, innanríkisráðharri, fer at taka við.

### Onga ávirkan

- Úrslitið av fronsku fólkaatkvøðuni fær onga ávirkan á avgerðina at halda fólkaatkvøðu um sama spurning her í september.

Tað segði Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, sunnukvøldið, tá tað var greitt, at fransmenn høvdu vrakað ES-grundlógina.

Men tey, sum eru ímóti grundlógini, hava eina aðra uppfatan av støðuni. Forkvinnan í Danska Fólkaflokkinum, Pia Kjærsgaard, vil vera við, at uppskotið til eina ES-grundlóg er fallið, nú fransmenn hava felt tað, og tí eigur danska stjórnin at avlýsa fólkaatkvøðuna tann 27. september, sigur hon.

Tað sama siga tey í Fólkafylkingini ímóti ES og Juni-rørsluni.

### Onnur mál avgerandi

Eygleiðarar í París søgdu sunnukvøldið, at teir fronsku politikararnir, sum eru fyri grundlógini, megnaðu ikki at fáa orðaskiftið at snúgva seg um grundlógina, og tí kom orðaskiftið at snúgva seg um ymisk fronsk innanríkismál. Tað gjørdi, at í roynd og veru var fólkaatkvøðan ikki um grundlógina, men heldur ein spurningur, um fólk vóru fyri ella ímóti Jaques Chirac, forseta og stjórnini.

Tað sama kann henda aðrastaðni, og nógv bendir á, at ymisk innanríkismál fáa eisini avgerandi ávirkan á fólkaatkvøðuna, sum verður í Niðurlondum í morgin. Har eru ymisk mál drigin upp í orðaskiftið, og tær seinastu meiningakanningarnar vísa, at ES-grundlógin fer eisini at fella har. Sambært teirri seinastu kanningini fara umleið 56 prosent at atkvøða ímóti.

### Mugu finna loysn

Sambært reglunum skulu øll tey 25 ES-londini góðtaka grundlógina, fyri at hon kann fáa gildi, og spurningurin er tí, hvat hendir, nú fransmenn hava vrakað hana, og niðurlendingar eftir øllum at døma fara at gera tað sama.

ES-serfrøðingar søgdu sunnukvøldið, at spurningurin má takast upp, tá ríkis- og stjórnarleiðararnir í teimum 25 londunum hittast í Bruxelles tann 16. juni. Víst verður á, at sambært reglunum skal grundlógin góðkennast innan árslok næsta ár, og tí er tað ikki óhugsandi, at spurningurin verður tikin uppaftur í Fraklandi og Niðurlondum eina ferð afturat til ta tíð. Hvat Fraklandi viðvíkir, er ikki óhugsandi, at landið fær loyvi at bíða eitt ár afturat, so fólkaatkvøða kann haldast aftan á forsetavalið har, sum verður í 2007.